## Duga vit nóg væl?

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, harmast um, at okkara rækjufloti liggur so lágt, sum hann ger í løtuni.

- Eg ivist onga løtu í, at vit hava havt góðar skiparar, men eg ivist í, um vit hava verið nóg góðir handilsmenn.

Jan sigur, at hann herfyri hitti føroying, sum veit um hálendskan fiskiskap og hálendsku rækjuvinnuna.

- Maðurin fortaldi mær, at eitt felag, sum hann hevur kent í Hálandi í nógv ár, í dag hevur einar 75 rækjubátar, sum fiska í nigerianskum sjógvi – og í løtuni letur felagið fýra nýggj skip byggja aftrat.

Jan Mortensen spyr, hví føroyskir rækjumenn ikki fyri langari tíð síðan hava keypt seg inn í feløg í eitt nú Grønlandi, soleiðis at teir á henda hátt kundu fingið lut í tí ríkidømi, sum grønlendingar eiga í rækjunum.

- Hyggja vit at, hvussu íslendingar hava gjørt, so hava hesir dúgliga keypt seg inn í feløgum ymsastaðni kring um heimin, og alt bendir á, at hetta hevur givið teimum nógv fleiri bein at standa á, enn vit hava, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

Jan Mortensen um íslendska vinnulívsmannin:

# Haldi tað er skeivt at døma fólk út frá gitingum

**Onkur spyr kanska, hví Vinnuhúsið júst valdi íslendingin, Bjørgólf Guðmundsson, at halda fyrilestur á Vinnudegnum 2005, men Jan Mortensen, stjóri, sigur, at hann hevði hoyrt søgurnar um mannin, áðrenn hann kom higar til lands. – Men eg haldi ikki, at vit eiga at døma mannin út frá søgum og gitingum, sigur hann**

VINNUDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Vinnudegnum 2005, sum Vinnuhúsið skipaði fyri, var nevndarformaðurin í Landsbanka Íslands, Bjørgólfur Guðmundsson, ein av gestarøðarunum.

Yvirskriftin til fyrilesturin hjá honum var, at "privatiseringar geva vøkstur".

Sambært ymiskum keldum, sum Sosialurin endurgav í blaðnum í gjár, eru ymiskar meiningar um virksemið hjá hesum íslendingi, sum telist millum ríkastu menn í landinum.

Í stuttum er søgan hon, at Bjørgólfur saman við soni sínum av sama navni og einum samstarvsfelaga, Magnusi Thorsteinsson, keyptu eitt íslendskt bryggjarí, sum teir í 1993 settu upp í Stk. Pætursborg í Ruslandi.

Eftir virksemið í Ruslandi, vendu menninir heimaftur til Íslands nøkur ár seinni við fleiri miljardum krónum í lummanum, og við at keypa ein stóran part av eitt nú Landsbanka Íslands, gjørdist Bjørgólfur nevndarformaður í landsbankanum.



*- Íslendingar hava verið sera dugnaligir at keypt og selt – og tjent pening, bæði í Íslandi og úti í heimi. Tey stóru londini skilja ikki rættiliga, hvussu tað ber til, at íslendingar soleiðis kunnu koma "brølandi" og keypa ognir fyri so stórar peningaupphæddir, sum teir gera, sigur Jan Mortensen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Kendi søgurnar

Jan Mortensen sigur, at tey hava ongar negativar viðmerkingar fingið frá teimum, sum vóru við á Vinnudegnum um, at júst Bjørgólfur var ein av gestarøðarunum.

- Bjørgólfur var í Føroyum, tá ið Fish Fair stevnan var her tíðliga í summar og fólk, sum høvdu hitt mannin, hildu hann vera áhugaverdan. Tó haldi eg, at hann í sínum fyrilestri á Vinnudegnum kendi seg í so bundnan av tí fyrilestri, hann helt.

Jan vísir á, at hyggur tú í útlendsk bløð, eru nógvar søgur og nógvar gitingar um íslendsku íløgurnar uttanlands, men hann heldur tað ikki vera rætt at døma fólk eftir søgum og gitingum – og soleiðis heldur ikki Bjørgólf Gudmundsson.

- Í Íslandi er eitt nýtt ættarlið komið til, og har er ein hópur av vælútbúnum fólki. Soleiðis, sum eg havi skilt, hava Bjørgólfur og hansara menn nógv gott og vælútbúgvið fólk aftrat sær.

Jan ásannar, at talan er um øgiligar peningaupphæddir, ið talan er um, men vísir á, at íslenndingar eins og aðrir hava eitt fíggjareftirlit.

- Eg havi sum so ongar fyritreytir fyri at meta um, hvussu íslendski fíggjarheimurin hongur saman, sigur stjórin í Vinnuhúsinum, sum kortini vísir á, at skuldi tað hent seg, at alt ikki er, sum tað "eigur", hevði virksemið ikki gingið í longdini.

### Koma "brølandi"

Í greinini í Sosialinum í gjár, vístu vit á, at íslendingar eiga íløgur í útlandinum fyri tilsamans 60 miljardir krónur í okkara peningi, harav einar 20 miljardir liggja í Bretlandi.

- Tað vísir seg, at íslendingar hava verið sera dugnaligir at keypt og selt – og tjent pening, bæði í Íslandi og úti í heimi. Tey stóru londini um okkara leiðir skilja ikki rættiliga, hvussu tað ber til, at íslendingar soleiðis kunnu koma "brølandi" og keypa ognir fyri so stórar peningaupphæddir, sum teir gera.

Jan vísir á, at íslendingar hava verið nógv fyrr á sjóvarfallinum enn føroyingar, tá ið ræður um virksemið í øðrum londum.

- Teir hava verið nógv fyrr at sæð teir møguleikar, ið hava latið seg upp við altjóðagerðini, meðan vit í størri mun hava sæð marknaðin sum ein hóttandi trupulleika, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

# Positivar afturmeldingar um vinnudagin

**Hetta var sætta árið á rað, at Vinnuhúsið skipar fyri Vinnudegi, har vinnulívsfólk úr øllum landinum koma saman at lýða á og at vera við, tá ið avdúkað verður, hvat virki verður kosið at vera Ársins Virki, og hvat tiltak fær heiðurin sum Ársins Átak**

VINNUDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, er sum heild væl nøgdur við Vinnudagin 2005, sum skipað varð fyri seinasta fríggjadag.

- Jú, eg haldi, at dagurin sum heild eydnaðist væl, men tað vilja altíð vera ting, sum kunnu gerast øðrvísi og betur.

Hann sigur, at afturmeldingarnar, ið tey hava fingið frá fólki, sum vóru við á degnum, eru positivar.

### Virki og Átak

Hetta var sættu ferð, at Vinnuhúsið skipaði fyri Vinnudegnum og somuleiðis sættu ferð, at Ársins Virki varð kosið.

- Ársins Átak var ikki við tvey tey fyrstu árini, men hevur verið við síðan, sigur Jan Mortensen.

Í sambandi við Vinnudagin, hevur Vinnuhúsið gestarøðarar, og soleiðis var eisini hesaferð.

- Vit hava altíð okkurt nýtt við hvørja ferð, men tá ið sjálvur Vinnudagurin bert verður hildin yvir ein seinnapart, er greitt, at dagurin hevur sínar avmarkingar.



*Teir sita og práta í steðginum á Vinnudegnum 2005, fv.: Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður, Poul Mohr, fyrrverandi skipasmiðjustjóri og Oddfríður Gregersen, fyrrverandi fiskavirkisstjóri*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Jan vísir á, at tiltakið at útnevna Ársins Virki og Ársins Átak, er ikki meira "orginalt" enn tað, at hetta hevur eitt nú Dansk Industri havt í fleiri ár.

- Í Danmark verða nógv fleiri viðislønir lætnar fyri ymiskt vinnuligt virksemi enn í Føroyum, sigur hann.

### Vit eru sjey - tey eru 400

Stjórin á Dansk Industri, Hans Skov Christensen, var millum gestarøðararnar á Vinnudegnum hesaferð.

- Hann er ein umhildin maður í donskum høpi og er ein stórur kapasitetur á sínum øki, sum lurtað verður eftir.

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur, at Dansk Industri er størsta vinnufelag í Danmark.

- Vit kunnu samanbera virksemið hjá Dansk Industri við virksemið hjá Vinnuhúsinum. Men meðan vit eru sjey fólk í starvi hjá okkum, starvast eini 400 fólk hjá Dansk Industri, sigur Jan Mortensen.